

# Uppibornir vinnarar

**Liðskiparin hjá Kyndli helt, at tá alt kemur til alt, so vóru teir uppibornir føroyameistarar hetta kappingarárið**

*– Nei. Eg fy rireikaði bara ein jubel-scenu, tí eg vist, at Jónleif fór at skora, segði Hans Áki um seinastu løtuna, tá hann tóktist krógva seg uppi á egnari hálvu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

MEISTARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir áskoðarar, sum ikki høvdu eyguni vent beint ímóti VÍF málinum seinastu sekundini av dystinum leygardagin, varnaðust kanska, at ikki allir leikarar tóktust hava nervar at hyggja at hesa løtuna.

Ein av hesum var liðskiparin hjá Kyndli, Hans Áki Dal Christiansen. Við troyggjuni til at krógva andlitið stóð hann uppi við Kyndils-málið, og heldur enn at hyggja at brotskastinum, stardu eyguni út í tóman heim móti gongini, men eftir dystin helt hann fyri, at hetta ikki hevi nakað við nervar at gera.

– Nei. Eg fyrireikaði bara ein jubel-scenu, tí eg vist, at Jónleif fór at skora. Men tá hann so hevði gjørt tað, gloymdi eg alt um hetta, og rann bara yvir.

### Tøkk fyri stuðulin

Um dystin sjálvan helt Hans Áki annars, at hann gjørdist júst so torførur, sum hann hevði roknað við. Og hann legði afturat, at hann hevði roknað við velduga endaspurtinum frá VÍF, sum mundi ognað teimum gullið.

– Vit hava altíð ein niðurtúr í hvørjum hálvleiki. So eg visti av vandanum.

– Og tað var so eisini um reppið, at vit mistu tað heila, men kortini haldi eg, at vit eru røttu vinnararnir í ár, tá tikið verður samanum. Eisini hóast tað ikki vóru allir VÍF-leikararnir, sum vildu taka í hondina á okkum eftir dystin. Sjálvir eri eg bara glaður, og lat meg so at enda senda eina lítla heilsan til áskoðararnar. Tit vóru fantastiskir í dag!

# Tóku gullið frá okkum

**Ingi Olsen staðfesti eftir dystin, at tað var eitt groft dómaramistak, sum gav Kyndli gullið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er einki at siga til, at tað var ein vónbrotin Ingi Olsen, sum vit fingu orðið á í løtunum eftir javnleikin á Hálsi.

13 sekund fyri leiklok tóktist hann hava skotið gullið til Vestmanna, men alt stríðið tóktist nyttuleyst, tá Kyndil kortini í seinastu sekundunum fekk javnað. Og tað við einum brotskasti, sum vestmenningarnir høvdu ilt við at góðtaka.

– Lat meg sjálvandi fyrst ynskja Kyndli tillukku. Teir eru kanska liðið, sum mett yvir kappingarárið eigur hetta uppiborið, men teir skuldu ikki fingið javnleikin í dag.

– Dómararnir tóku meistaraheitið frá okkum við hasum brotskastsdóminum. Tað eri eg sannførdur um. Hatta hevði einki sum helst við brotskast at gera.

### Óluksáligt

Men mitt í øllum vónbrotinum, so kundi Ingi tó fegnast um, at teir høvdu verið við til at givið áskoðarunum eina fantastiska hondbóltsuppliving av slíkum slag, sum sjáldan er sædd her á landi.

– Hetta er akkurát tað, sum vit høvdu vónað. Karmarnir vóru fantastiskir, og dysturi gjørdist akkurát so spennandi, sum nógv høvdu roknað við. Bara óluksáligt, at tað skal vera ein so grovur feilur, sum avgerð meistaraheitið. Tað havi eg sera trupult við at góðtaka, segði ein vónbrotin Ingi Olsen at enda.



*– Dómararnir tóku meistaraheitið frá okkum við hasum brotskastsdóminum, segði Ingi Olsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Moyr rivjabein

**Hóast hann illa fekk spælt fyri pínu, so stríddi Jacob Jónsson seg ígjøgnum allar 60 minuttirnar, og hann átti so sanniliga sín stóra lut í meistaraheitinum**

*Hóast hann brákaði eitt riv ella tvey tíðliga í dystinum, so var tað Jacob Jónsson, sum stóð aftan fyri seinastu og avgerandi gjøgnumbrotsroyndina hjá Kyndli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

MEISTARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein púrasta ferdigur Jacob Jónsson, sum vit fingu orðið á í sigursløtuni hjá Kyndli leygardagin.

At kalla allan dystin hevði hann spælt við stórari pínu, tí ein samanbrestu í fyrra hálvleiki hevði kostað honum eitt rivjabein ella tvey, men kortin inoyddi hann seg at spæla.

Og treiskni merkti so eisini, at hann var maðurin, sum við seinastu gjøgnumbrotsroyndini fekk framtvingað avgerandi brotskasti, men hvat helt Jacob sjálvur um avgerðina hjá dómarunum. Var hon røtt?

– Nú síggi eg sjálvandi ikki støðuna, men eg royndi so av øllum alvi at bróta ígjøgnum. Eg varð tikin í hesi royndini, og so er tað upp til dómararnar at gera av, hvørt talan var um brotskast ella ikki seðgi Jacob Jónsson eftir dystin, sum kanska varð hansara seinasti í fremstu hondbóltsrøðini.

Ein dag sum leygardagin var sjálvandi eingin, sum tosaði um at gevast, men við 40 árum og 25 av hesum í vaksnamannahondbólti, er einki at siga til, um tankarnir skjótt fara at leita tann vegin. Og tað sigst jú, at tú skalt gevast á toppinum.





*Tað stóð nógv á Hjá Birgiri Hansen leygardagin. Men sum skilst, so stóð enn meira á hjá starvsfelaganum, sum yvir í Noreg fekk lurtað eftir tí mesta av øðrum hálvleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kári lurtaði í Noreg

**Vit taka time-out í seinasta minuttinum, men hóast vit tá gera greiðar avtalur, so megnaðu vit kortini at tveita leiðsluna fyri borð, segði ein troyttur Kyndil-venjari eftir teir 60 minuttirnar á Hálsi leygardagin**

MEISTARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er einki at siga til, um Kyndils-venjarin var móðu eftir gullbrakið leygardagin.

Ikki minst hevði hann í seinna hálvleiki roynt at brotið ljóðmúrin, sum áskoðararnir kring vøllin skaptu, men hóast nakrar av leiðbeiningunum funnu vegin fram, so mátti hann tó hjálparsleysur hyggja at seinastu løtuna, tá Kyndil tóktist tveita alt fyri borð.

- Vit hava jú tamarhald á dystinum alla tíðina. Og við yvirtali og einum máli á odda, so skuldu vit megnað at hildið fast, sigur venjarin um hesa seinastu løtuna.

- Tað eydnast tó teimum at javna, og tá takið eg so eisini eitt time-out, soleiðis at vit kunnu prenta inn í leikararnar, at nú mugu vit ikki tveita nakað burtur. Avtalan varð, at vit skuldu víst tol, til ein góður møguleiki at skjóta kom, og so gera vit akkurát ikki tað. Finnur roynir seg púra óneyðugt við einum skoti, og tá teir so skora upp á brotskastið, helt eg alt vera liðugt. Og í øllum førum skuldu vit tá hava hepnið við okkum, um vit skuldu javnað.

- Vit høvdu so sjálvandi hasi sekundini afturat, og vit tóku so eisini málverjan út fyri ein útispælara, og onkursvegna so eydnaðist tað heila so kortini. Tað var fantastiskt – men samstundis ræðuligt.

### Kári í Noreg

Og so kundi Birgir leggja afturat, at hjálparmaður hansara í venjarasessinum, Kári Nielsen, heldur ikki hevði havt tað so gott.

Sum vit áður hava skrivað, so fekk Kári ikki verið við til seinasta dystin. Hann skuldi ístaðin á skíðferiu í Fraklandi, men leygardagin var hann ikki komin longur enn til Noregs.

- Hann hevði so fingið allan seinna hálvleik við í bilinum, men móti endanum var hann farin út. Hann orkaði ikki at lurta meira, men støðan varð so sjálvandi ein onnnur, tá vit fingu brotskastið, sigur Birgir flennandi.

Sjálvur hevur Birgir annars verið við til at vinna fleiri meistaraheiti. Og millum annað vóru bæði hann og Kári leikandi venjarar tað árið, tá Kyndil og VÍF leiktu fýra javnleikir í einum kappingarári.

- Tær ferðirnar slapp man so at spæla við. Hetta at sita uttanfyri, meðan so nógv stendur á, er so nógvar ferðir verri.

Og so helt venjarin eisini at enda, at hann mátti geva nakrar rósur til leikararnar fyri avrikið.

- Eg haldi serliga, at Jacob og Jónleif eru fantastiskir í dag. Longu tíðliga í dystinum fær Jacob skaða, men hóast eg spurdi hann, hvørt hann vildi skiftast út, so treiskaðist hann. Og hann er so eisini maðurin, sum fær brotskastið. Saman við Jónleifi var hann høvuðsmaðurin í dystinum í dag, sigur venjarin, áðrenn hann leggur afturat, at Jónleif als ikki skuldi nýtast so nógv, sum talan bleiv um.

- Bæði Jónleif og Finnur vóru fyrst og fremst ætlaðir at avlasta aðrar leikarar, men byrjanin av dystinum broytir nógv í so máta. Vit fáa als ikki glið á spælið, og tí royndi eg meg so við nøkrum broytingum, sum tíbetur góvu úrslit. Og tað vísti seg akkurát at vera nóg mikið.




Tillukku við greipuni

Føroya Banki og Trygd ynskja Stjørnuni hjartaliga tillukku við greipuni.

TRYGD

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870 / Mynd: Norðlýsið